# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MARKNAGIL

Við heimild í 4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, verður ásett:

## § 1. ØKIÐ SAMTYKTARINNAR

Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali er matr. 917, 918a, 918b, 918c, 918d, 918e, 918f, 919a, 919b, 919c, 1099, 1100, 1101, 1102a, 1102b, 1102c, 1104d, 1173a, 1173b, 1173c, 1174 og 1177.

## § 2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa økið við Marknagil til miðnámsskúla, fólkaskúla, ítróttarbygging og miðstaðarbygging/bústøðum og hartil hoyrandi veganet, parkeringspláss og fríøkið.

Stk. 2. Økið er avmarkað av Marknagilsvegnum, Landavegnum, útstykkingin í Svanga og útstykkingini við Perskonugøtu, og er uml. 187.000 $m^2$ til støddar.

Stk. 3. Sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í umráðispørtunum C3 (miðstaðaendamál, skúlar, almennar stovnar og íbúðir), D1 (almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt), D2 (ítróttur) og D3 (stórir almennir stovnar fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt).

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

Økið verður sundurbýtt í eindirnar Ia, Ib, II, III og IV.

*Stk. 1.* Eindin Ia Skúladepil

a) Eindin skal nýtast til skúladepil til tekniska skúla, handilsskúla, studentaskúla og HF-skeið og onnur undirvísingarendamál.

*Stk. 2.* Eindin Ib, Fólkaskúli

a) Eindin skal nýtast til fólkaskúla.

Stk. 3. Eindin II ítróttarendamál

a) Eindin skal nýtast til ítróttarhøll.

*Stk. 4.* Eindin III, Miðstaðar- og bústaðarbygging

a) Eindin skal nýtast til miðstaðarendamál, t.e. handlar, smærri stovnar, skúlar, skrivstovuhøli, ráðleggingarvirki og tænastuvirki ið hava samband við hetta og bústaðir.

*Stk. 5.* Eindin IV, Alment frílendi/alment endamál

a) Eindin verður í síni heild løgd út til náttúru og mentunarlig endamál og tílíkt.

## § 4.VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegatgongd og vegir í økinum

a) Atgongdin til økið er frá Marknagilsvegnum eftir atkomuvegum 1 og 2, og frá Landavegnum eftir atkomuvegi 3.
b) Atkomuvegir skulu verða í minsta lagi 10 m íroknað 2 m gongubreyt í báðum síðum.
c) Bylingsvegir skulu verða í minsta lagi 9 m íroknað 2 m gongubreyt í báðum síðum
d) Seyrugøta skal verða í minsta lagi 5 m.

Stk. 2. Parkering í økinum

a) Parkering í økispartunum Ia og Ib verður skipað eftir eini heildarmeting sambært viðfesta korti.
b) Parkering í økispartunum II og III skal skipast eftir galdandi reglum

## § 5. BYGGING, STØDD, STAÐSETING OG SNIÐ HÚSANNA

Stk. 1. Eindin Ia Skúladepil

a) Byggistigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,25
b) Nettonýtslustigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,30
c) Sum grundarlag til útrokning av byggi- og nettonýtslustigið, kann eindin IV (Alment frílendi) roknast við sum partur av náttúrliga avmarkaða økinum.

*Stk. 2.* Eindin Ib, Fólkaskúli

a) Byggistigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,25

b) Nettonýtslustigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,30

Stk. 3. <u>Eindin II ítróttaendamál</u>

a) Byggistigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,25
b) Nettonýtslustigið innan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki má ikki fara uppum 0,30

*Stk. 4.* <u>Eindin III, Miðstaðar- og Bústaðarbygging</u>

a) Byggistigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,4
b) Nettonýtslustigið fyri økispartin má ikki fara upp um 0,8

*Stk. 5.* <u>Eindin IV, Alment frílendi/alment endamál</u>

a) Á eindin IV skal ikki verða bygt

## § 6. ÚTSJÓND HÚSANNA

Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggivaldið.

*Stk. 2.* Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## § 7. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

*Stk. 2.* Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 18/01120 |
| Ætlanarskriv: | 15/2 - 2019 |
| Góðkent: | 18/2 - 2019 |
| Váttað: | [signature] |




| | | | |
|---|---|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna**<br>Byggi- og býarskipanardeildin | | | |
| **Heiti:** | Broyting av serstøk byggisamtykt fyri øki við Marknagil | | |
| **Viðmerking:** | Broytingaruppskot | | |
| **Skjal nummar:** | | **Journal nr:** | 14/02888 |
| **Dagur:** 07.05.2014 | **Mát:** | **Tekna:** | MKJ/KF |
| **Rættað:** | | | |

**HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ**

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

18. februar 2019
**Mál**: 18/01120-8
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

***Góðkenningarskriv***

**Broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 18. desember 2018, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til broyting í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil til góðkenningar.

Ætlaða broytingin er, at nýtslustigið í økisparti III, sum er ætlað miðstaðar- og bústaðarbygging í serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil, verður hækkað úr 0,5 til 0,8.

Økið liggur í C3 øki í almennu byggisamtyktini, har mest loyvda nýtslustig er 0,8, men í serstøku byggisamtyktini er mest loyvda byggistig 0,5.

Orsøkin til ætlaðu broytingina er, at ætlanin er at byggja m.a. lestraríbúðir á matr. nr. 919a og 919b.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 8. oktober til 19. november 2018. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, hevði kommunan móttikið eitt mótmæli frá grannum, sum heittu á kommununa um ikki at loyva tættari bygging enn upprunaliga ætlað

Kommunan hevur ikki tikið mótmælið til eftirtektar. Grundgevingin er m.a., at kommunan metir, at tað er ráðiligt, at mest loyvda byggistig í C3 øki er 0,8, og at tað er hóskandi við fleiri íbúðum í økinum. Eisini verður sagt, at økið í kommunuætlanini er bývakstrarøki.

Býarskipanarnevndin hevur havt málið til ummælis og mælir í ummæli sínum, dagfest 11. februar 2019, til, at broytingin verður góðkend. Tó helt nevndin, at kommunan átti at tikið meiri atlit at ferðsluni í økinum, í sambandi við ætlaðu broytingina.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við ummælinum frá Býarskipanarnevndini. Víst verður somuleiðis til viðmerkingarnar frá Býarskipanarnevndini.

Sagt verður frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir broytingina í serstøku byggisamtyktina við Marknagil, sum omanfyri nevnt.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo

Mint verður á, at hóast Heilsu- og innlendismálaráðið nú hevur góðkent broytingina í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu eftir reglunum í býarskipanarlógini, so sleppur kommunan ikki undan at fáa til vega møguliga aðrar góðkenningar frá øðrum myndugleikum. Víst verður til kunngerð nr. 57 frá 27. apríl 2001 um kommunala byggimálsviðgerð.

Hjálagt rættað byggisamtyktartekstur við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri